Nr. 83 7. juni 2011

# Kunngerð um løgujáttan

Við heimild í § 27, nr. 6 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan, verður ásett:

## Kapittul 1 Virkisøki

**§ 1.** Løgujáttan verður brúkt í sambandi við bygging, ognan ella avhending av bygningum, løgum og skipum o.ø. og í sambandi við stór viðlíkahaldsarbeiði, sbrt. § 22, stk. 1 í lógini.

**§ 2.** Stuðul og lán til løguverkætlanir verða tikin við sum stuðulsjáttan ella lógarbundin játtan, alt eftir rættargrundarlagnum.

## Kapittul 2 Løguútreiðslur

**§ 3.** Løguverkætlanir mugu ikki setast í verk, fyrrenn játtan er fingin til vega, umframt at avvarðandi myndugleiki hevur góðkent verkætlanina og samlaðu løguupphæddina.
*Stk. 2.* Samlaða løguupphæddin skal fata um allar útreiðslur fyri, at løgan eftir ætlan kann takast í nýtslu, herundir innbúgv, størri útgerð og uttanumøkið.

**§ 4.** Størri løguverkætlanir upp á 10 mió. kr. ella meira, skulu gerast við grundarlagi í eini verklagslóg.
*Stk. 2.* Við heimild í ásettu samlaðu løguupphæddini í verklagslógini, kann landsstýrismaðurin gera avtalur, sum hava við sær byggiútreiðslur í komandi fíggjarárum, um so er, at hetta er neyðugt fyri at gera skynsamar sáttmálar við atliti at valda útbjóðingar- og byggiháttinum, og treytað av, at tann samlaða løguupphæddin verður hildin.

**§ 5.** Við átekning kann verða givin heimild at flyta óbrúktar løgujáttanir til seinni fíggjarár, sbrt. § 22, stk. 2 í lógini.

**§ 6.** Í viðmerkingunum til løgujáttan skal vera ein frágreiðing um tað ávísu løguverkætlanina og upplýsingar um samlaðu løguupphæddina, við útreiðslunum liðaðar á fíggjarár, sbrt. § 22, stk. 3 í lógini.

**§ 7.** Landsstýrismaðurin er ikki bundin av sundurgreiningini av fleiri løguverkætlanum undir somu høvuðskontu, treytað av, at samlaða løguupphæddin av einstøku verkætlanunum ikki verður broytt og farið ikki verður upp um játtanina.
*Stk. 2.* Er talan um atgerðir, sum bera í sær munandi broytingar í einstøku verkætlanini og atgerðir, sum bera í sær eina hækking av samlaðu løguupphæddini fyri einstøku verkætlanina, kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, vegna avvvarðandi landsstýrismann, ráðføra seg við fíggjarnevnd Løgtingsins um broyttar fortreytir fyri játtanini.
*Stk. 3.* Er talan um nýggjar løguverkætlanir, sum ætlanin er at fremja undir somu høvuðskontu, men sum ikki eru lýstar í viðmerkingunum til løgujáttanina, kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, vegna avvarðandi landsstýrismann, ráðføra seg við fíggjarnevnd Løgtingsins um broyttar fortreytir fyri játtanini.

## Kapittul 3 Løguinntøkur

**§ 8.** Løguinntøkur kunnu bert verða havdar, um so er, at heimild er fyri hesum á fíggjarlóg. Um ikki, skal játtan verða fingin til vega, áðrenn avhending av løgu kann verða framd.
*Stk. 2.* Viðmerkingar til inntøkujáttanir skulu lýsa grundarlagið undir inntøkumetingum, sbrt. § 22, stk. 4 í lógini.

**§ 9.** Bygningar, løgur og skip o.a. kunnu ikki avhendast, fyrrenn hesi hava verið lýst alment til sølu.

## Kapittul 4 Ígildiskoma

**§ 10.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. juli 2011

Fíggjarmálaráðið, 7. juni 2011

**Aksel V. Johannesen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Atli Suni Leo